# DANSISKEIÐ

*Nu kvøldini gerast longri,*
*verður aftur farið at svinga...*
*....um nóg nógv tekna seg,*
*skipar Dansifrøi fyri dansiskeiði í*
*aulini í studentaskúlanum í Hoydølum.*



Bólkarnir verða hesir:

**Týskvøld**

Bólkur 1: 19.00 til 20.00 Argentinskur tango
Dansleiðarar: Anne Lise og Mads A. Winther
Tilmelding á tlf.: 31 53 10

Bólkur 2: 20.30 til 21.30 Fólkad./danspøl.
Blanda hold við livandi tónleiki
(*Kristian Blak, Hilmar Joensen og aðrir gestatónleikarar*)
Dansleiðari: Sharon Weiss
Tilmelding á tlf.: 31 48 15 / 21 71 19 ella til
tutl@post.olivant.fo

**Hóskvøld**

Fólkadansir & Danspøl
Bólkur 3: 19.00 til 20.00 Byrjarar
Bólkur 4: 20.00 til 21.00 Tey ið hava dansað 2 ár ella meira
Bólkur 5: 21.00 til 22.00 Tey ið hava dansað í fleiri ár
Dansleiðarar: Ruth og Jógvan Martin Mørk
Tilmelding á tlf.: 31 61 25 ella til
jm0810v5.skulin.fo

**Kostnaður fyri dansiskeiðið 2005/2006 er kr. 500,00 + limagjald.**

Dansiskeiðið byrjar týskvøldið 20. september 2005 til 16. mars 2006. Áhugað verða biðin um at tekna seg sum skjótast. Gjaldast skal við fyrsta frálærutíman

Eins og undanfarnu ár skipar Dansifrøi fyri dansifrálæru í gomlum sum nýggjum dansum.

*Tað liggur nær at hugsa sær, at tað at dansa gamlar dansir er gamaldags.*

Men soleiðis munnu tey yvir 1500 fólkini, sum í eitt styttri ella longri tíðarskeið hava verið limir í dansifrøi, neyvan hava hugsað.

At dansa er stuttligt, at dansa er eisini ein góður máti at koma burtur frá tí dagliga arbeiðsresinum...

Dansifrøi er eisini annað enn dansur! Tann sosiala samveran er eisini ein týðandi partur av felagsskapinum.

**Dansifrøi**

# Til sølu
## Arbeiðsskúrar / Summarhús

Um hóskandi boð fæst, eru 3 arbeiðsskúrar / summarhús til sølu.

Skúrarnir eru samanbygdir, gólvvíddin er 32 m²

Innrættingin er:
· Durur – wc v/vask
· Køkur v/matarhøli
· Fundarrúm og skrivstova

Í skúrunum er el hiti, tlf, heitt vatn, køliskáp.

Skúrarnir, sum eru í sera góðum standi, eru klárir at heinta 1. november 2005.

Rottangi fylgir við.

Kunnu skoðast í Kvívík

Boð kunnu gevast við at ringja til
**Sp/f G.A.J. Smíð**
**v/Grækaris Joensen**
**Tel 21 22 65**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Barsilsavloysari fyri granskingarhjálpara

Søkt verður eftir avloysara fyri granskingarhjálpara til Føroyamálsdeildina at arbeiða 3/4 tíð í umleið 1/2 ár.

Uppgávan hjá granskingarhjálparanum er fyrst og fremst at vera hjálparfólk hjá granskarunum, haruppií at røkja søvn á deildini. Eisini skal hjálparin kunna dagføra heimasíður (upplæring fæst) og ganga til handa í avgreiðsluni.

**Tú hevur:**
- Exam.art.-prógv í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.
- Góðan telduførleika.
- Góð samstarvs- og tillagingarevni.
- Sjálvstøðugt arbeiðslag.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarflokki V.

Starvið verður sett skjótast til ber.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eivind Weyhe, deildarleiðara - eivindw@setur.fo

Umsóknarfreistin er 27. september 2005. Umsóknir við avritum av próvskjølum, viðmælum o.ø. skulu sendast:

**Føroyamálsdeildini**
Fróðskaparsetur Føroya
V. U. Hammershaimbs gøtu 16
Postrúm 272
110 Tórshavn
tlf. 352520
faks 352521

## Reyði Krossur Føroya skeið

**Grundskeið í 1.hjálp (12 tímar)**
30. september kl. 19:00-22:00
1. oktober kl. 10:00-16:00
8. oktober kl. 10:00-15:00
**Kostnaður kr. 700,-**

**Endurútbúgving (3 tímar)**
(Grundskeið ikki eldri enn 3 ár)
16. oktober kl. 14:00-17:00
**Kostnaður kr. 105,-**

**Tilmelding:**
Navn: ______________________
Bústaður: ______________________
Tlf.: ______________________
Teldupostadr: ______________________

☐ Grundskeið ☐ Endurútbúgving
☐ Ynski uppýst um skeið í Sálarl. 1.hjálp
☐ Meldi meg til SAMARIT bólkin

Tilmelding við hesum lepa til:
**Reyði Krossur Føroya**
Postbox 1015, 110 Tórshavn
ella á teldupostadr: redcross@redcross.fo

Føroya Blindastovnur

# Stuðulsgrunnur Føroya Blindafelags

Umsóknir um peningaligan stuðul úr Stuðulsgrunninum skulu vera grunninum í hendi í seinasta lagi 3. oktober 05.

Umsóknarbløð fáast hjá Føroya Blindafelag

Adr. Føroya Blindastovnur
Íslandsvegur 10 A
100 Tórshavn
tlf: 31 82 22

**Endamál grunnsins er:**
At veita hjálp til blind og sjónveik, ið til fánýtis hava søkt um hjálp.

At veita stuðul til luttøku á skeiðum, fundum og øðrum tiltøkum fyri sjónbrekað í Føroyum og uttanlands – tó treytað av, at umsøkjarin er limur í Føroya Blindafelag.

**Nevndin**

# Pedagogur til frítíðaransingina

Søkt verður eftir pedagogi til frítíðaransingina at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 01. november 2005.

Lønin er samb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. 443 325 ella 743 125.

Skrivlig umsókn við avritum av møguligum prógvum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. september 2005.

Um ongin skikkaður umsøkjari er, verður hjálparfólk sett í starv.

**Leirvíkar Bygdarráð**